# Føtur undir egið borð

**Mikukvøldið 14. mars kl. 19.30 skipar Javni fyri fundi í Klinguni í Norðurlandahúsinum.**

Á fundinum verður ljós varpað á bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni.

- Hvussu er støðan á økinum, og hvørji eru framtíðarútlitini?
- Hvat siga tey við menningartarni?
- Hvat siga foreldrini?
- Hvat siga politikararnir?

Fundurin er almennur, og øll eru hjartaliga vælkomin.

## Møtið fjølment

Javni er felag, sum arbeiðir fyri góðum umstøðum til børn, ung, vaksin og eldri við menningartarni. Javni vil fegið hava eitt samfelag, har rúm er fyri øllum, og har øll kunnu hava eitt gott lív út frá egnum fortreytum og ynskjum.

javni – Virkin og virðismikil

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo

REPROZ

STARVSLÝSING

# Elektrikari

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi elektrikara til skervverkini hjá okkum kring landið og asfaltverkið í Hundsarabotni.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um viðlíkahald og umvæling av elútbúnaði á skervverkunum sum eru í Hundsarabotni, Hústoft, Sandoy og Þorkeri og asfaltverkinum í Hundsarabotni.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum elektrikari ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála ímillum Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið. Starvið er fastlønt.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. mars, 2007. Merk umsóknina „Umsókn elektrikari“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á tlf. 540 841 ella umvegis teldupost to@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi og havna myndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

# Shell sóknast eftir tveimum fólkum til umsitingina

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Starvið**
Talan eru um starv í avgreiðsluni á Viðarnesi í Havn. Í løtuni er arbeiðsøkið í høvuðsheitum:

- Kundaavgreiðsla, serliga um telefon
- Ordramóttøka og koyriplanlegging
- Uppræta nýggjar avtalur og kundar
- Virka fyri meirsølu av vørum og tænastum hjá Shell
- Bókingar og avstemmingar
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

Føroya Shell er í ferð við at umskipa umsitingina. Lyklaorðini í hesum sambandi eru betri og sterkari kundatænasta og umsiting, har dentur verður lagdur á eitt mennandi og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi og førleikamenning.

Talan er um fulltíðarstarv, men ávísir møguleikar eru at arbeiða niðursetta tíð.

**Tann, vit leita eftir**
Hevur royndir í skrivstovuyrkinum, er fyrikomandi og nærlagdur, hevur lætt við at samskifta og hevur góð samstarvsevni. Tað er fyrimunur, um tú hevur royndir í kundaavgreiðslu og dugir at arbeiða við EDV.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum og møguleikum fyri persónligari og yrkisligari menning. Talan er eisini um góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meiri um hetta starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johnni Poulsen, fíggjarleiðara, á telefon 34 74 00.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til P/F Føroya Shell, att. Johnni Poulsen, Postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo. Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin, 19. mars.

## AVLOYSARI FYRI STJÓRASKRIVARA

Fyri skrivara okkara verður søkt eftir avloysara, fyribils inntil 31.12.2007.

**Starvið**
Talan er um áhugavert starv sum skrivari hjá stjóranum. Harumframt eru fleiri sjálvstøðugar uppgávur at loysa.

**Tann, vit leita eftir**
Hevur royndir við telduarbeiði og dugir at nýta forritini Word og Excel. Góður málkunnleiki, serliga til føroyskt og enskt, gevur fyrimun. Ástøðilig útbúgving er fyrimunur, men eingin treyt. Dentur verður lagdur á, at tú hevur áræði, kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur royndir í skrivstovuyrkinum.

**Vit kunnu bjóða**
Góð arbeiðsviðurskifti, góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir, umframt góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Hevur tú hug at vita meiri um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hákun Djurhuus, stjóra, ella Johnni Poulsen, fíggjarleiðara, á telefon 34 74 00.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til P/F Føroya Shell, att. Hákun Djurhuus, Postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo. Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin, 19. mars.

REPROZ

**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

**Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo**